# Leiðari til Kolvetnisskattadeild

Toll- og Skattstova Føroya

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík, røkja raksturin.

Núverandi setanarøki er Klaksvík, men fevnir annars um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir hennara, og tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrinum, í hendi í seinasta lagi

**30. oktober 2001.**

Starv sum leiðari av nýggju kolvetnisskattadeildini í Klaksvík er leyst at søkja, og skal setast skjótast gjørligt. Deildin verður skipað sum ein deild av Stýrinum hjá Toll- og Skattstovu Føroya á Argjum. Toll- og Skattaráð Føroya er sambært lóg um kolvetnisskattafyrisiting og lóg um toll- og skattafyrisiting ovasti álíkningarmyndugleikin.

**Deildin skal taka sær av øllum viðurskiftum í samband við**

1) Loyvishavarar, t.e. skattaborgarar, ið hava inntøku av sølu av framleiddum kolvetni v.m.
2) Feløg v.m., ið reka vinnu, ið er knýtt at virkseminum í 1)
3) Løntakarar, ið arbeiða hjá teimum, ið eru nevnd í 1) og 2)

Partar av kolvetnisskattafyrisitingini, sum farið er í gongd við at leggja á Tvøroyri, skulu so við og við økjast, tá/um gongd kemur á kolvetnisvinnuna. Tað kemur at áliggja leiðaranum saman við deildini annars at skipa fyri, hvørjir aðrir partar av fyrisitingini skulu liggja á Tvøroyri, sum fyrisitingarliga kemur at vísa til deildina í Klaksvík.

**Høvuðsuppgávurnar hjá deildarleiðaranum verða eitt nú**

- at hava yvirskipaðu leiðsluna av deildini
- at fáa til vega og innrætta neyðugu hølini til deildina
- at fyrireika álíkningina av komandi inntøkum frá kolvetnisvinnuni
- at leggja til rættis saman við serkønum fólki kunngerðir og rundskriv o.a.m. kolvetnisskattingini viðvíkjandi
- at skipa fyri kunning um kolvetnisskattingina fyri loyvishavarum v.m.
- at skipa fyri útbúgving av starvsfólki

**Førleikakrøv til starvið**
Roknað verður við, at leiðarin hevur leiðsluroyndir og hevur royndir av at arbeiða í leiðslubólkum, sum taka avgerðir, tí deildin kemur at taka avgerðir í tøttum samstarvi við deildirnar og leiðsluna í Stýrinum. Neyðug útbúgving krevst helst frá hægri lærustovni, sum gevur innlit í flestu fakligu spurningar, sum fylgja við starvinum, eisini krevst kunnleiki til enskt mál. Umsøkjari við neyðugari útbúgving annars, sum hevur leiðsluroyndir frá almennari umsiting, hevur fyrimun.

Í skattligum høpi snýr tað seg um, at menna eitt heilt nýtt øki, byggja eina nýggja deild upp og at velja neyðug starvsfólk til deildina, sum hava góðan fakligan førleika. Umsøkjarin skal tí bæði hava virkisfýsni og slagkraft, vera smidligur, liðiligur og hava góð samstarvsevni.

**Vit bjóða**

- eitt spennandi starv við avbjóðingum, fakliga eins væl og persónliga
- innanfyri ávísar karmar at skipa arbeiðsumstøðurnar sjálvur
- flextíð
- eftirútbúgvingarmøguleikar bæði í Føroyum og uttanlands

**Setanartreytir**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi fakfelag.

Spurningar hesum viðvíkjandi kunnu setast Stýrinum, Marjun Reinert Simonsen ella Óla Heinesen tlf. 352600.

*Toll- og Skattstova Føroya*
*Stýrið*
*Postsmoga 2151*
*FO-165 Argir*




---

TK Stovan

## Kunningarfundur um KT-trygd

**Mánadagin 22. okt. kl. 13.00 á Hotel Føroyum**

**Kunningarfundur um, hvussu virkið kann verja seg móti telduvirus og teldusníkum**

Kunningarfundurin er ætlaður virkisleiðslum og fólki annars, sum hevur áhuga í evninum. Endamálið við kunningarfundinum er á lættskiljandi máli at lýsa økið **KT-trygd**, og hvat virki kann gera fyri at verja sítt teldukerv og teldusamskifti. Við øðrum orðum, hvussu verja vit okkum best móti dagsins hóttanum, sum **telduvirus og teldusníkum**.

**Skrá:**

**13:00** VÁÐAR
Jónsvein Joensen, cand. merc. dat, frá KT-fyritøkuni Faroesoft (VIT) greiðir, í fyrra innleggi sínum, frá váðanum í mun til valda KT-trygd. Eisini kemur hann inn á ymisku váðarnar í KT-lívssyklusinum, t.e. frá tí at støða skal takast til KT-keyp til tað sum keypt er, verður tikið í brúk. Hvussu er kostnaðurin av KT-trygdini í mun til nyttuvirði.

**13:30** KT-VIRKISØKIR OG POLITIKKUR
Jóhan Martin Jacobsen, sum er serútbúgvin KT-grannskoðari frá grannskoðaravirkinum Rasmussen & Weihe, kemur í sínum innleggi inn á KT-trygdarpolitik í ymisku KT-virkisøkjunum. Nøkur av evnunum hann nertir við eru: bygnaður, stýring av brúkarum og atgongd, menning, útvegan og viðlíkahald av KT-skipanum, rakstur, dokumentatión, fysisk trygd, tilbúgving og trygdargjøgnumgongd.

**14:00** KAFFISTEÐGUR

**14:20** AKTUEL VIÐKOMANDI EVNI
Jónsvein Joensen ferð í seinna innleggi sínum, at taka upp ymisk vandamál, sum eru frammi í hesum tíðum, og sum hava nakað beinleiðis við KT-trygd at gera. Evnini verða millum onnur internet og tess vandamál, E-business, bókhald og peningaflutningur, edv í mun til manuelt, opinleiki í mun til forboð, etikk og moral.

**14:50** JURA
Magnus S. Petersen frá Advokatskrivstovuni kemur í sínum innleggi inn á lógfrøðilig sjónarmið í samband við KT-trygd.

**15:10** TRYGGING
Niels Juul Akraberg Poulsen frá Tryggingarfelagnum Føroyar greiðir frá, hvørjum tú kanst tryggja teg ímóti, og hvat hendir í tryggingarhøpi, um nú vanlukkan er hend.

**15:30** PRAKTISKAR ROYNDIR
Føroysk virkir greiða frá sínari KT-trygd og teirra royndum

**16:10** SAMANDRÁTTUR

**16:30** LIÐUGT

**Tilmelding:**
TK Stovan, fax nr. 31 93 63, tlf. nr. 31 73 66 ella teldupost tk@tk.fo.
Kostnaður: kr. 400,00 u/mvg.
Tilmelding í seinasta lagi fríggjadagin 19. okt. 2001.

Virkisnavn:____________________ Tal av luttakarum:__________

Navn/Nøvn:______________________________

______________________________

Tlf:____________________ Fax:____________________

**TK Stovan**
Niels Finsensgøta 37, FO-100 Tórshavn
**Tel** +298 317366, **Fax** +298 319363
tk@tk.fo
**www**.tk.fo

**VILJI VITAN VØKSTUR**
TK Stovan er ein liður í menningini av føroyska vinnulívinum og samstundis ein partur av tí umfevnandi danska TIC-kunningarsamstarvinum.

---

## SU Aðalfundur

Aðalfundurin hjá Sosialistiska Ungmannafelagnum, ið verður í hølunum á Áarvegnum, er útsettur til leygardagin 27.10.

**Nevndin**






# Gøtu Kvøldskúli

## veturin 2001/2002

**Boðað verður frá luttøku á hesum støðum:**

| Lærugrein og dagur | Lærari | Tlf. |
|---|---|---|
| **Ættargransking** mikudag | Hansina Olsen | 441056 |
| **Teldulæra** týsdag | Reinhold Isaksen | 441753 |
| **Gittarspæl á byrjunarstøði** hósdag | Tórhallur Justinussen | 443114 (eftir kl. 16.00) |
| **Klaverspæl** mánadag | Magnus Jacobsen | 444457 |
| **Lær at svimja** mánadag | Oluffa á Høvdanum | 442122 |
| **Lær at telva** mánadag | Reinhold Isaksen | 441753 |

Øll undirvísing er treytað av nóg stórari luttøku og myndugleikanna góðkenning. Byrjað verður eftir avtalu við læraran.



**Gøtu Kvøldskúli**

---

# Rætta dekkið til røttu tíð og fyri rættan prís

Tíðin nærkast tá ið dekk skulu skiftast - tryggja teg í góðari tíð, við teimum røttu dekkunum fyri tann rætta prísin - og til øll bilmerki

Kleber
DĘBICA
Gislaved

**Bílegg nú!**

| | |
|---|---|
| Ford Service 900 Vágur · | tlf. 373600 |
| Ford 700 Klaksvík | tlf. 456959 |
| Ford P/f Wenzel, Akranesgøta, 100 Tórshavn | tlf. 354515/354516 |

**P/f Wenzel**
Tlf. +298 313873, Fax +298 311173 · Fyrisiting ( Head Office ):
Akranesgøta 5, Boks 3043, FO-110 Tórshavn
Pláturverkstaður: Marknagilsvegur 86, FO-100 Tórshavn
Heimasíða: http://www.wenzel.fo Teldupost: wenzel@post.olivant.fo

**Sosialurin** -tað loysir seg

---

# Samfelagsstevna í Ebenezer

Samfelagsmøti verða, um Gud vil, frá mikudegi 7. til og við sunnudag 11. november.

Møtini fríggjakvøldið, leygardagin og sunnudagin verða hildin í Ítróttarhøllini á Hálsi. Greiniligari kunngerðir koma seinni.

*Ein og hvør er hjartaliga vælkomin til hesi møti.*

**Samkoman í Ebenezer**

---

# Starv sum málsviðgeri

Toll- og Skattstova Føroya

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja rakst-urin.

Núverandi setanarøki er Sandoyar Øki, men fevnir annars um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir teirra, og tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

*Heimasíða*
*www.tollskatt.fo*

*E-mail*
*tollskatt@tollskatt.fo*

Søkt verður eftir málsviðgera til Sandoyar Øki. Tann umsøkjarin, vit fyri kortum valdu út, tók annað starv. Tí lýsa vit starvið leyst av nýggjum.

**Høvuðsuppgávur**
Álíkningar- og eftirlitsarbeiði og málsviðgerð innan meirvirðisgjald og toll, skatt og innkrevjing o.a., herundir at geva ummælir í møguligum kærumálum. Arbeiðið er rættuliga sjálvstøðugt, tá tann, ið settur verður, skal kunna taka sjálvstøðugar avgerðir. Í ivamálum hevur hann beinleiðis tilvísing til deildirnar í Stýrinum.

**Førleikakrøv**
Tann, sum settur verður, skal hava roknskaparligan førleika. Umsøkjarar við roknskaparligari útbúgving hava fyrimun. Viðkomandi, ið settur verður, skal hava vilja til at luttaka í teimum útbúgvingarmøguleikum, sum Toll- og skattstovan bjóðar bæði í stovninum og uttan fyri stovnin eitt nú á handilsskúla v.m. og taka lut í teimum skeiðum, sum stovnurin fyriskipar. Viðkomandi skal vera arbeiðssamur og fyrikomandi, og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt. Eisini er ynskiligt, men tó ongin treyt, at viðkomandi býr í Sandoynni.

**Vit kunna bjóða**
Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini er fakliga krevjandi og við møguleikum fyri eftirútbúgving, v.ø.o. eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir**
Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Spurningar hesum viðvíkjandi** kunnu setast Randi Røsvik, roknskaparleiðara, á tlf. 35 26 00.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi

**19. oktober 2001**

Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið
Postsmoga 2151
FO 165 Argir